


Ralph Freeman arbeiðir við menning innan tilfeingismál so sum olju í New Foundlandi. Hann gjødist ikki sørt hugtikin av føroysku framløgunum. Her er hann við faldara um føroyska oljuleiting í 2017 og um føroyska tænastudepilin. Mynd Jan

# Kanadiumaður um Føroya-framløgur í Hørpu: Tær vaktu ans

**Jan Müller**

19.10.2015 - 12:51

Oljan.fo

Jan Müller úr Reykjavík

Um tað var hepni ella gott fyrireikandi arbeiði ella bæði tvey, so má tað sigast at vera ikki sørt av einum bragdi, at tað eydnaðist føroysku luttakarunum við løgmanni og einum føroyskum fólkatingsmanni á odda at fáa atgongd til størsta pallin og entá til ta bestu tíðina leygardagin. Føroyar eru smáar í arktiskum høpi men als ikki uttan týdning. Tað ræður um

at halda seg framat, ikki minst tá føroyingar skulu út í stóru verð at umboða okkara land. Og tá er framførslan í Hørpuni á Arctic Circle eitt gott dømi um.

Eftir eina sera áhugaverda sessión um altjóða íløgur í framtíðar Arktis, “**THE FUTURE OF ARCTIC INFRASTRUCTURE PUBLIC-PRIVATE PARTNERSHIP ARCTIC INVESTMENT PROTOCOL” ið nettupp snúði seg um m.a. somu spurningar, sum føroyingar løgdu fram,** har bæði íslendski forsetin Ólavur Ragnar Grímsson og stjórin í Guggenheimgrunninum, Scott Minerd, (*Global Chief Investment Officer of Guggenheim Partners), fingu føroysku umboðini pallin fyri seg sjálvar, og tá var salurin nærum fullur.*

*Ein av áhoyrarunum var kanadiumaðurin Ralph Freeman frá ”Centre for Arctic Ressource Development”, sum oljan.fo hitti eftir framløgurnar.*

*”Eg má vera ærligur og viðganga, at eg var ikki sørt hugtikin av tykkara framløgum. Var eg íleggjari, so hevði eg skrivað mær tykkara ætlanir bak oyrað,” sigur Ralp Freeman, sum umframt at halda Føroyar sum tænastumiðdepil vera sera áhugaverdan ætlan, eisini helt oljusøguna, sum Sjúrður Skaale greiddi frá við sera góðum myndum úr Føroyum, vera sera áhugaverda eisini fyri ein kanadiumann úr St. John í New Foundlandi.*

*Hann heldur føroyingar kunnu læra nógv av royndunum hjá New Foundlandi, tá tað ræður um oljuleiting og oljuvinnu.*

*”Her eru fleiri umboð bæði fyri vinnuna og myndugleikarnar í New Foundlandi og Labrador, so eg giti, at hesi fara at lata dyrnar upp, um føroyingar koma at vitja fyri at læra av okkara royndum,” sigur Ralph Freeman við føroyska oljuportalin.*

*Teirra leiklutur var annars at umrøða teirra lond og umráði sum øki ávegis til Arktis.*